


# Grafiskar linjur og nýggjar litsamansetingar

**VÁR- OG SUMMARMÓTIN** TIL **BÆÐI** KVINNUR OG MENN BJÓÐAR **NÝGGJAR LITIR**, NÝGGJAR **LITSAMANSETINGAR** OG **SPENNANDI** GRAFISKAR **LINJUR** VIÐ SKØRPUM **KANTUM**

***PREI:*** *Húðin skal skyggja og til tað ber til at nýta base-prep, sum tú smyr innanundir brúnkreminum, ella mineral putur.*

***PREI:*** *Eygnabrýr, sum eru væl røktar, hava sítt natúrliga skap og ikki eru tyntar ov nógv við pinsett, umframt nógv maskara á vippunum, framhevjar eyguni.*








**Pixel**

Pixel er heitið á vársminkuni frá Make-up Store. Tað er eitt stórt lop frá vetrarsminkuni, sum var køld og glitrut, til nýggju sminkuna, sum er heit og litrík. Her er alt loyvt, og vit skulu hugsa øðrvísi og ósiðbundið, t.d. ikki tóna eygnaskuggarnar út, men lata skørpu kantarnar síggjast. Til pixel røðina eru bæði litríkir eygnaskuggar, eygnablýantar (sum vit viðmæla!), lipgloss, neglalakk o.m.a. Litirnir eru koral, gult, reytt, limegrønt, grasgrønt og blátt.



**Prada Men's collection vár og summar 2011**

Eisini Prada hevur tikið táttin upp við somu frísku litum og litsamansetingum, sum ikki eru heilt vanligar. Mannfólkaklæðini hava eisini skarpar linjur og ósiðbundin snið.





**Bottega Vanetta Women's collection vár og summar 2011**

Hetta er fyrsta klædnarøðin frá Bottega Vanetta, sum annars vanliga ger taskur og tilhoyr. Her hava tey spælt sær við grafikkin, litirnar og samansetingarnar og hava eisini nógv við korallittum, reyðum, grønum og bláum litum.



**Jil Sander vár og summar 2011**

Jil Sander er gingin heilt nýggjar leiðir og hevur eina óvanliga litríka og sprøkluta kollektión bæði til menn og kvinnur. Meðan menninir hava strømm klæðir, sum kanksa enntá tykjast ov smá, hava kvinnurnar stór og flákrandi pløgg, sum kanska tykjast ov stór.



**Gucci vár og summar 2011**

Tað klassiska er nú fylt við alskyns litum, tí eisini Gucci er farin við í kórið, sum í vár prædikar nógvar, sterkar litir og skarpar linjur og snitt.